DAGSINS MEINING

Breiða semjan

Í takkarrøðu síni eftir løgmansvalið seinasta týsdag legði Jóannes Eidesgaard stóran dent á breiða samstarvið og breiðar semjur. Hetta er sera skilagott og hetta er positivt. Ein tann størsti veikleikin hjá fráfarandi samgongu var, at hon hevði so smalt mandat. Eitt smalt mandat er sjálvandi í princippinum eins legalt og eitt breitt mandat, ein meiriluti er jú ein meiriluti, og í fólkaræðinumm ræður meirilutin sum kunnugt. Hinvegin má ásannast, at har talan er um stórar og lagnutungar avgerðir, avgerðir, ið fara at fáa víttrøkkandi fylgjur fyri land og fólk, er smala mandatið ein vansi. Í slíkum førum er best fyri allar partar, at landsstýrið hevur eitt breitt mandat, at eitt landsstýri hveur ein breiða og haldgóðan meiriluta aftan fyri seg. Eingin einstakar tingmaður ella smáflokkur eigur at kunna taka eitt samlað landsstýri um gíssla undir slíkum umstøðum. Hartil kemur, at tað hevur almennan týdning, at víttrøkkandi avgerðir hava breiða undirtøku í fólkinum. Tað var jú vanlukkan við fullveldisleiðini, at hon ikki hevði breiða fólkslig undirtøku.

Tann samgongu, sum júst er komin til valdið, skal taka stórar og tungar avgerðir. Løgting og landsstýri skulu finna eina breiða tjóðskaparliga semju um framtíðar viðurskifti okkara við Danmark. Henda semja skal í meginregluni vera í samsvar við Tvøroyararskjalið, um Fólkaflokkurin skal kunna liva við henni. Men henda semja skal eisini vera so mikið mýkt, at veljarar Javnaðarflokksins fyri ikki um at tala veljarar Sambandsflokksins skulu kunna góðtaka hana. Hetta verður fyrsta stóra forðingin á vegnum hja nýggju samgonguni. Kunnu flokkarnir finna eina loysn, sum lýkur krøvini hjá øllum trimum landsstýrisflokkum og helst Sjálvstýrisflokkinum við, so eru útlitini fyri, at landsstýrið situr tíðina út, góð.

Men har eru aðrir snávingarsteinar á vegnum. Skattalógaruppskotið hjá sambandsflokkinum hevur skapt stór misnøgd og órógv millum láglønarbólkar. Vit loyva okkum at mæla landsstýrinum til at rudda upp í hesum hurlivasa sum skjótast, og støðga kavaböltinum, áðrenn hann fer á rull. Tað skal ikki tað stóra politiska kynstrið til at greiða hesa skattapoltitisku kisuna, so her er bara at fara til verka sum skjótast. Annar snávingarsteinurin er pensionsmálið. Uppleggið er frálíkt og heilt í tráð við teir tankar, sum eru frammi um øll Norðurlond. Kunnu flokkarnir semjast um ein hóskandi leist, so er nógv vunnið. Eisini á hesum øki eigur at vera roynt eftir breiðum semjum t.v.s. út um sitandi samgonguflokkar, tí tann loysnin, sum kemur, verður galdandi fyri eitt langt tíðarskeið fram. Vit venda aftur til røðu løgmans í eini seinni oddagrein.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Er nýggi landsstýrismaðurin í fíggjarmálum Bárður Nielsen sannorðaður?

Niklái Petersen
tjóðveldismaður

Í valsendingini í SVF týsdagin 6. januar - hvar valevnir fyri Norðurstreymoyar valdømi luttóku - førdi undirritaði fram, at uppskot sambandsfloksins um skattalættar kom at kosta landskassanum minst 328 mió.kr., og kom als ikki teimum lægstløntu til góðar. Hetta afturvísti Bárður Nielsen uppá tað harðasta, og segði millum annað, at skattalættin als ikki kom at kosta 328 mió.kr. og so langt frá tí. Hesi vóru orðini hjá nývalda fíggjarmálaráðharranum. Hetta kann lurtast eftir í bandasavninum hjá SVF, um nakar hevur áhuga í tí.

Somuleiðis er komið undan kavi, at kommunurnar fáa eina væl minni skattainntøku, tøl um 53 mió.kr. eru nevnd, eftir at fólk á Toll og Skattstovu Føroya hava hugt uppskotið leystliga ígjøgnum.

Undir valstríðnum førdi Bárður Nielsen ferð eftir ferð á valfundum fram, at tann sokallaði skattareformurin hjá sambandsflokkinum kom teimum lágløntu tilgóðar. Vit hoyra nú í fjølmiðlunum at hetta er ikki so, og nú ásannar komandi fíggjarmálaráðharrin alment, at tað verða tær góðu inntøkurnar, sum fá størsta skattalættan í krónum og oyrum, um skattalættin verður framdur, soleiðis sum ABC - samgongan hevur sett sær fyri.

Við øðrum orðum verður gjógvin djúpari og djúpari millum tey lágløntu og so hini, um hesin leisturin verður fylgdur.

Gamalt hevur verið í Føroyum, at man letur tær sterkastu herðarnar, taka tað tyngsta takið, men her sær út til at vera vent í holuni nú ABC - samgongan slapp framat.

Javnaðarflokkurin hevur altíð sagt seg vera fyri samhaldsfesti - verja tey lægstløntu og veiku í samfelagnum - teir hava kanska selt seg fyri mammon ?

Vónið ikki, at hetta verður framt í verki á tann hátt, sum nývaldi fíggjarmálaráðharrin hevur verið talsmaður fyri.

Kundi verið áhugavert, at vita frá fíggjarmálaráðharranum hvussu skattareformurin skal fíggjast, samstundis sum sosialir batar skulu fremjast.

Annars fari eg at ynskja nývalda løgtinginum og landstýrinum góðan byr framyvir.

Kotið

Nicolina Jensen Beder

Sjóstúkan hin síða
hvønn halgidag man prýða
og friðka abba tín;
ikki prýður abba mín
kotið gamla viða.

Hans A. Djurhuus.

Heitið kot á føroyskum hevur bert verið nýtt til eitt ávíst plagg, sermerkt av tilfari og útsjónd. Væl varð farið um, tá ið ull skuldi fáast til vega til kotavadmal, sjálvt í bóndans garði kundi tað henda, at tey máttu hava fleiri áseyðaroytingar, fyri at fáa nóg nógv av svartari ull, hetta valdaðist sjálvsagt um, hvussu nógvan svartan seyð, tey høvdu. Havi hoyrt, at tey á bóndagarðinum »Á Hellu« í Kvívík høvdu væl av svørtum seyði, júst við kotavadmalinum fyri eyga. Hans, bóndi, segði, at um ein skuldi velja sær lamb við svartari ull, skuldu endarnir á ullini vera reyðlittir, tá grónaði ullin ikki so illa. Kona Hans, Bina, var ófør til hendurnar, vav bæði kota- og buksuvadmal. Tað má hava verið hugaligt hjá bóndafólkunum, tá ið tey vóru felags um áhugan fyri besta tilfari. Mamma mín, Súsanna, bóndadóttur úr Lamba, segði mær, at so væl skuldi ullin nappast til kotavadmal, at tá ið hon helt seg vera lidna at nappa, lat hon ullina liggja náttina yvir, fyri at taka hana aftur morgunin eftir og halda hana upp ímóti ljósinum, fyri at hyggja eftir broddahárum.

Tíðirnar broyttust, og kotini vóru vovin úr tí tilfari, ein kundi keypa frá spunavirkjunum. Hóast hetta kundu vit kalla tað fyri kot. Frá einans at hava verið vovið, varð nú farið bæði at binda og tøva og samstundis kalla tað fyri kot. Hetta haldi eg vera stórt spell. Vit hava nøkur føroysk heiti, sum vísa á nakað heilt sermerkt, sum vit eiga at verja. Verður funnið uppá nakað nýtt sum tildømis við kotinum sum íblástur, eigur viðkomandi plagg at hava egið heiti.

Tað, sum fekk meg at taka pennin í hond, var lýsingin í Dimmu 27. jan. »Jósef og ótrúliga litfagra dreymakotið.« Har verður greitt frá, at sangleikurin er bíbilskur og snýr seg um Jósef, sum av brøðrunum verður seldur til Egyptaland. Víðari verður greitt frá, at ósemjan millum brøðurnar stóðst av, at páp-in gjørdi mismun teirra millum og Jósef, við at geva Jósefi eitt ótrúliga fagurlitt kot, meðan teir noyddust at ganga í seyðaskinnum.

Skal sangleikurin eitast at vera bíbilskur, var tað løgið, at lata Jósef í kot og brøðurnar í skinn. Í Bibliuni stendur: Mós. 37,3. Og Ísrael unti Jósef fram um allar synir sínar, av tí at hann var ellissonur hans; og hann læt gera honum ein síðan ermakyrtil. – Kyrtil, hálv sýtt, leyst og vítt klædnaplagg, – ofta við belti – til menn og kvinnur. Tað einasta, vit kunnu siga út frá hesi upplýsing, er at brøðurnir bert áttu stuttan kyrtil og helst ermaleysar, tá nú ermarnar verða nevndar. Jósef hevði heldur ongan dreym um nakað kot. Mós. 37,6. »Hoyri nú henda dreym, sum meg hevur droymt! Sí, vit fingust við at binda bundi úti á akrinum, og sí, tá reis bundi mítt og stóð beint upp; meðan bundi tykkara stóðu kringum og lútaðu mínum bundi.«

Henda lýsing minnir meg um, einaferð ein ommusonur hevði verið í sunnudagsskúla, og eg spurdi hann, tá ið hann kom heim aftur, hvat hann hevði hoyrt: Jú, segði hann, vit hoyrdu um Nóa, tá ið hann sendi eina kráku út at leita eftir blekki. Ommusonurin hevði ivaleyst býtt um í hugaheimi sínum, ravnin, við kráku, og grøna oljuviðarblaðið við blekkið.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Veljarakanningar undan løgtinsvalinum 20. januar 2004

Regin Reinert
hagfrøðingur, Gallup

Fleiri veljarakanningar blivu gjørdar undan løgtingsvalinum, og aftan á valið vóru ávisir flokkar, ið kanska vóru ónøgdir við, at úrslitið av valinum ikki bleiv júst so sum veljarakanningarnar høvdu spátt, og sum hildu, at allar veljarakanningarnar høvdu ávirka úrslitið av valinum. Serliga vóru tað umboð fyri Sambandsflokkin, sum hildu seg vera við sviðusoð og meintu, at veljarakanningarnar ávirkaðu úrslitið av valinum.

Tað er umráðandi at halda fast við, at ein veljarakanning vísir eina støðumynd av politiska vígvøllinum. Spurt verður, hvat ið veljarin "ætlar" sær at velja á løgtingsvalinum. Eingin trygd er fyri, at tey fólk, sum spurd eru, ikki seinni broyta meining og síðani atkvøða fyri einum øðrum flokki, enn tí, ið tey hava sagt seg vilja atkvøða fyri í veljarakanning.

Aðrastaðni er vanligt at gera exit-poll kanningar, har ið veljarin verður spurdur aftaná, at hann hevur valt, um hvat ið hann valdi. Exit-poll kanningar eiga í prinsippinum at geva eitt rætt úrslit av tí, at veljarin ikki seinni fær møguleika at broyta meining. Tó eru altíð onnur viðurskifti, ið eisini gera seg galdandi, og tí kann ein heldur ikki rokna við, at exit-poll kanningar raka púra beint.

Vanligt er, at kanningarstovnar brúka exit-poll kanningar til at prógva at mannagongdirnar eru rættar, tá ið kanningar verða gjørdar. Um exit-poll kanningarnar raka skeivt, fæst ein ábending um, at mannagongdirnar í sambandi við veljarakanningar og marknaðarkanningar yvirhøvur eiga at broytast. Val eru einastandi høvi hjá kanningarstovnum at kanna seg sjálvar fyri at vita, um úrslitini av meiningarkanningum og øðrum marknaðarkanningum eru á góðari leið.

Í alt 5 veljarakanningar vórðu gjørdar undan valinum (talva 1).

Løgtingsval varð útskrivað 5. des. 2003. Fyrsta veljarakanningin aftaná, at løgtingsval varð útskrivað, kom frá Gallup longu 16. des. Sum flestu veljarakanningar, ið annars vórðu gjørdar, síðani løgtingsvalið í 2002, vísti hendan kanningin risastóra framgongd til Sambandsflokkin. Á valinum í 2002 fekk Sambandsflokkurin 26,0% av atkvøðunum, nú stóð hann til at fáa 29,7% av atkvøðunum. Veljarakanningin í desember skuldi vísa seg at geva Sambandsflokkinum heili 6,0% meira, enn flokkurin fekk á sjálvum valinum 20/1. Tjóðveldisflokkurin stóð í desember til at fáa 19,4% av atkvøðunum ella 2,3% færri atkvøður, enn hann seinni fekk á valinum.

Veljarakanningin, sum Gallup kunngjørdi saman við Dimmalætting og SvF 15/10 vísti, at nú stóð Sambandsflokkurin bert til at fáa 27,0% av atkvøðunum - ein afturgongd uppá 2,5% í mun til kanningina hjá Gallup í desember. Tjóðveldisflokkurin sá út til at hava vunnið nakað av tí mista. Tjóðveldisflokkurin stóð nú til 20,2%, ein framgongd uppá 0,8% í mun til kanningina í desember.

Sama dag sum næsta kanningin hjá Gallup kom, 15/1, kunngjørdi Fynd eina veljarakanning. Henda kanningin gav Sambandsflokkinum nógv betur úrslit enn Gallup-kanningin. 29,0% í mun til tey 27,2%, sum Gallup-kanningin vísti. Kanningin hjá Fynd gav ongar ábendingar um, at valstríðið hjá Sambandsflokkinum kanska ikki hepnaðist nakað serligt - tvørtúrímóti gav kanningin eina framgongd uppá 0,5% í mun til kanningina, sum Fynd almannakunngjørdi 11/1.

Gallup kunngjørdi seinastu kanningina undan valinum 18/1 í útvarpinum. Av øllum kanningum, ið gjørdar vórðu undan valinum, var hetta tann, ið rakti nógv tættast við endaliga úrslitið. Samlaða frávikið í mun til endaliga úrslitið var 6,9% ella minni enn 1% í meðal fyri hvønn av teimum 7 flokkunum, sum stillaðu upp. Kanningin vísti samstundis, at afturgongdin hjá Sambandsflokkinum helt á - hann stóð nú til at fáa 26,1% av atkvøðunum, sum tó var 2,4% fleiri, enn flokkurin fekk á sjálvum valinum. Tjóðveldisflokkurin stóð nú til at fáa 22,2% av atkvøðunum - hetta var 0,5% fleiri, enn flokkurin fekk á valinum tveir dagar seinni.

Seinasta kanningin hjá Gallup rakti sera tætt fyri teir stóru flokkarnar, Sambandsflokkurin undantikin, sum framvegis stóð til at fáa eitt hampiligt val. Allarhelst hevur Sambandsflokkurin eisini mist atkvøður seinastu dagarnar í valstríðnum. Kanningin undirmetti teir tríggjar smáu flokkarnar. Møguliga hevur Sambandsflokkurin mist atkvøður til teir smáu seinastu dagarnar undan valinum. Annars er tann lutfallsliga størsti feilurin úrslitið hjá Sjálvstýrisflokkinum. Um gravað verður í tølunum hjá Gallup, so er tað serliga stóra framgongdin hjá Sjálvstýrisflokkinum í Suðurstreymi, sum kom óvæntað.

Um hugt verður í einum at teimum trimum Gallup-kanningunum, so vísti gongdin greitt, at Sambandsflokkurin kláraði seg ikki væl í valstríðnum og misti atkvøður, so hvørt sum valið nærkaðist. Tjóðveldisflokkurin hinvegin stóð seg væl og vann atkvøður í valstríðnum.

Tað er ikki óvanligt at taparin í einum vali gevur veljarakanningum skyldina. Veljarakanningar eru bert eitt av óteljandi inntrykkum, sum veljarin fær undir einum valstríði og sera ivasamt er hvørja ávirkan veljarakanningar hava á veljaran. Sjálvrannsakan hevði hóska seg betur, heldur enn at givið veljarakanningum skyldina fyri vánaligt val.

Dato	16-12-03	15-01-04	18-01-04	11-01-04	15-01-04	20-01-04
Stovnur	Gallup	Gallup	Gallup	Fynd	Fynd	Val
Tal av interviewum	510	535	532	2800	1050	
Fólkaflokkurin	21,1 (+0,5)	21,9 (+1,3)	20,8 (+0,2)	19,8 (-0,8)	19,3 (-1,3)	20,6
Sambandsflokkurin	29,7 (+6,0)	27,2 (+3,5)	26,1 (+2,4)	28,5 (+4,8)	29,0 (+5,3)	23,7
Javnaðarflokkurin	20,6 (-1,2)	20,8 (-1,0)	22,2 (+0,4)	22,1 (+0,3)	21,5 (-0,3)	21,8
Sjálvstýrisflokkurin	4,3 (-0,3)	3,5 (-1,1)	3,2 (-1,4)	3,9 (-0,7)	4,1 (-0,5)	4,6
Tjóðveldisflokkurin	19,4 (-2,3)	20,2 (-1,5)	22,2 (+0,5)	19,4 (-2,3)	20,6 (-1,1)	21,7
Miðflokkurin	4,9 (-0,3)	4,9 (-0,3)	4,3 (-0,9)	4,1 (-1,1)	4,4 (-0,8)	5,2
Hin Stuttligi Flokkurin		1,5 (-0,8)	1,2 (-1,1)	2,1 (-0,2)	1,1 (-1,2)	2,3
Frávik í alt	12,9	9,5	6,9	10,2	10,5	

Talva 1. Veljarakanningar undan løgtingsvalinum 20/1-2004. Frávikið í mun til endaliga úrslitið stendur í klombrum. Síðsta reglan vísir frávik í alt. Kanningin ið rakti nærmast við endaliga úrslitið er kanningin, sum Gallup og Útvarpið kunngjørdu tveir dagar undan valinum.

Stórbroyting í Granskingini

Ásmundur Guðjónsson

Samgonguskjalið millum A,B,C viðgerð gransking í fleiri støðum. Fleiri áhugaverdar vendingar í eru um gransking, sum eiga at verða viðgjørdar nærri. Tað er torført at at meta um, hvussu langt ein kann loyva sær at tulka samgonguskjalið. Men givið er tó, at tað er væl tugt ígjøgnum av fleiri politikkarum, og tað sum har stendur, er ikki komið av tilvild, men rættiliga medvitað.

Granskingin verður nevnd í trimum støðum í samgonguskjalinum. Tað, sum er sermerkt er, at hetta bara er undir vinnupolitikkinum, millum annað har kappingarføri verður viðgjørt, undir aling og til seinast undir orku. Brotið um Fiskivinnupolitikk nevnir ikki gransking, men kanska er tað tí, at granskingin er nevnd undir vinnupolitikkinum? Men tað, sum er mest undrunarvert, er, at granskingin er burtur í mentunarpolitikkinum. Setrið verður gott nokk umtalað í brotinum um mentunarpolitikk, men bert sum ein útbúgvingarstovnur.

Ein kann spyrja um "Breiða semjan" hevur ætlanir um at leggja á ein heilt annan bógv viðvíkjandi gransking og granskingarpolitikki. Samgonguskjalið kann tulkast tann vegin, at semja er um at raðfesta niður partar av granskingini, sum gongur fyri seg á setrinum og raðfesta upp granskingina, sum gongur fyri seg í øðrum stovnum og er meira vinnurelaterað. Í øllum førum kann signalvirðið í samgonguskjalinum skiljast soleiðis. Tíðin kemur at vísa, hvat hetta merkir í verki.

Vinnupolitikkurin leggur upp til skapa fortreytir fyri vinnuna at mennast. Hetta skal millum annað gerast við at granska innan KT, gentøkni og lívtøkni. Harumframt verður førleikamenning undirstrikað. Hóast hetta eru kendir setningar, ein hevur sæð fyrr, er tað framvegis lika aktuelt at satsa henda vegin! Trupulleikin er bara at fáa flosklarnar ítøkiliggjørdar og operationellar. Hetta eydnaðist ikki undir seinastu samgongu, men nú hevur man enn ein tjans at gera nakað við hetta!

Samgongan ætlar at "skapa eitt felags granskingarumhvørvi har vísundi og vinnuáhugamál skapa nýggj virði". Tað at skapa eitt felags granskingarumhvørvi ljóðar sera áhugavert. Vónandi snýr hetta seg ikki bara um gransk-ingina, sum vinnumálaráðharrin ræður yvir, men um alla gransking. Tað verður spennandi at síggja, hvussu hesin tankin kemur at hátta sær í verki.

Víðari verður sagt, at "játtanirnar til gransking skulu samskipast". Somuleiðis ein áhugaverdur setningur og sipar til eitt evnið, sum hevur verið tjakað í granskingarumhvørvi og aðra staðni. Samskipan av granskingarjáttanum eigur heldur ikki bert at fevna um vinnumálaráðið, men um alla gransking.

At samskipa játtanirnar til gransking verður eitt megnartak. Her er nógv at taka hond í. Vit hava alt ov nógvar stovnar, sum fáast við granskingarvirksemi. Hugt eigur at verða eftur um ikki samanleggingar og endurskoðan hvat stovnarnir fáast við, kundi givið eina miðvísari og sterkari gransking. Sum dømi kann nevnast at vit hava einar 7 - 8 stovnar sum granska í lívfrøði. At skera hetta talið niður í helvt, uttan tó at skerja játtanirnar hevði givið møguleika til aðra gransking, sum ikki verður gjørd í dag.

At samskipa leysu játtanirnar til gransking er somuleiðis ein viðkomandi og spennandi uppgáva. Tað hevur fyrr verið ró uppundir at fingið eitt tætt samstarv millum allar grunnarnar og kanska framtaksgrunnin eisini, soleiðis at hesin peningur verður satsaður miðvíst uppá førleikamenning og vinnufremjandi tiltøk.